# Púra svakligt at flyta til Æðuvíkar





*Innan eru húsini avskildrað, men enn vantar nakað í til Oddfinnur Olsen og familja hansara kunnu flyta inn í nýggja heimið. - Vónandi verður tað í ár, sigur hann*



*Oddfinn Olsen arbeiðir hjá eini fyritøku, har hann m.a. smíðar síni egnu hús. Hann gleðir seg til dagin, tá hann kann flyta inn í húsini, eftir at hava búð í keyptum húsum í mong ár*

**Tað er ikki bert jólaprýði og jólahugni sum fáa fólk at búseta seg í fjarskotnu bygdini Æðuvík. – Hetta er eitt sera gott stað at búgva í. Eitt satt paradís fyri børnini, sigur Oddfinnur Olsen. Hann sjálvur ættaður úr Streymnesi, men hevur búð her meginpartin av lívi sínum**

BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Æðuvík:** - Eg hoyri onkran siga, at tað er so avsíðis at búgva her í Æðuvík, men tað halda vit í øllum førum ikki.

- Tað er faktiskt skjótari hjá okkum at koyra til fótbóltsvøllin við Løkin, enn hjá fólki ovarlaga í Runavík, sigur Oddfinnur Olsen úr Æðuvík.

Ein góðveðursdag í farnu viku arbeiddi hann við at leggja takið á eini spildurnýggj hús í Æðuvík.

Beint norðanfyri hesi

## Besta stað á jørð

Hóast Æðuvík liggur fjarskotið og ikki beinleiðis við alfaraveg, hevur fólkatalið ligið rættiliga støðugt seinastu átta árini.

Í 2000 búðu 91 fólk í bygdini, í fjør 100 og tá farið varð inn í hetta árið var talið hækkað við einum íbúgva aftrat – til 101.

Hinvegin kann ein staðfesta við berum eygum, at talið av sethúsum er vaksið, veksur støðugt og fer somuleiðis at veksa enn meiri tey komandi árini.

Fyrstu fólkini búsettust her í 1897, og alt tykist benda á, at hesi best røktu bygdini í 2001 verður lív lagað í framtíðini.

Herfyri fluttu fólk inni í eini nýggj hús í grannalagnum hjá Oddfinni. Nú standa so tvey hús í gerð aftrat og gongst sum ætlað fara fólk undir at byggja á tveimum grundøkjum í sama øki.

- Vit halda í øllum førum, at hetta er eitt fínt stað at búgva í, slær Oddfinn fast.

Hann kann av sonnum úttala seg um hetta, tí sjálvur hevur hann búð her í samfull 23 ár. Nú hann er í ferð við at byggja sær síni egnu hús og eini onnur grannahús av Suðuroyarslagnum, verða helst munandi fleiri fólk í bygdini.

Hóast bygdin hvørki hevur handil ella skúla, finst bæði missiónshús og barnagarður her – og aalt jólaprýðið, sum hevur gjørt hesa lítlu bygdina heimskenda í Føroyum.